# Skrivstovufulltrúi

Søkt verður eftir skrivstovufulltrúa til Føroya Stiftsstjórn at taka við starvi 1. september ella so skjótt til ber; fyribils verður starvið sett fram til 28. februar 2003.

Føroya Stiftsstjórn umsitur ávís viðurskifti í fólkakirkjuni so sum kirkjuligar lógir, prestagarðar og arbeiðsviðurskifti hjá prestunum. Stiftsstjórnin umsitur eisini kirkjugrunnin, sum løgtingið játtar pening til á fíggjarlógini. Biskupur er ovasti kirkjuligi myndugleiki í Føroyum, hvat prestum og kirkjuráðum viðvíkur, og hevur umsjón við teimum.

Upp í starvið sum skrivstovufulltrúi hoyrir starvið sum bókhaldari. Stiftsfulltrúin hevur høvuðsábyrgdina av peningaviðurskiftunum hjá stiftsstjórnini og samskipar arbeiðið; hann er málsviðgeri í lønarmálum og hevur eftirlit við prestalønum; hann hevur ábyrgd av roknskapinum, bókhaldinum edv.

Bókhaldsskipanin hjá stiftsstjórnijni er EDV-skipanin CONCORDE C5, har fleiri persónar kunnu arbeiða samstundis. Skrivstovan hevur journalskipan á EDV (Com-jour), og tekstviðgerðin er Word 7.0 (Windows 98).

Dentur verður eisini lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góðan kunnleika í EDV og føroyskum máli og stavseting.

Starvið verður lønt sambært S&K-felagssáttmálanum og felagssáttmála fyri skrivstovufólk í danska statinum. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um starvsroyndir, avritum av prógvum og viðmælum verður send Føroya Stiftsstjórn, J. Paturssonargøta 20, postrúm 8, 110 Tórshavn. Umsóknarfreistin er úti 25. juli 2002. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup Nielsen, stiftsfulltrúa, tlf. 311995.

**Stiftsstjórn Føroya**
J. Paturssonargøta 20,
Postrúm 8
110 Tórshavn

# Bátur til sølu

**Um hóskandi boð fæst:**

Aqua Star 38 við fiskiloyvi 5 D.
Motorar: 2x240 HK ferð 18 míl.
Alla vanliga nautiska útgerð.
Línuspæl.
Eisini útgjørdur til snelluveiðu.

**Tlf. 456026**

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd frá 22. juli til 19. august 2002.

FØROYA JARÐARRÁÐ

fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo



# Handilslærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til handil okkara at byrja skjótast tilber, tó kunnu vit bíða eftir tær, um tú verður líðugur í handilsskúlanum nú.
Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðslu, útkoyring og bílegging av vørum og goymsluhald v.m.

Tað er eitt krav, at tú hevur koyrikort og HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Partur av lærutíðini gongur fyri seg í skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki er bangin fyri at arbeiða sjálvstøðugt og taka eina ábyrgd.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær spennandi lærutíð við nógvum spennandi avbjóðingum, sum tú kann hava stóra gleði av seinni í lívinum.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi kunnu tit ringja til okkum á tlf. 311071.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til okkum í seinasta lagi 22.07.02.

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo



# Opel Corsa 1.4 16V 5H

Bilurin er myrkagrønur. Fyrstu ferð skrásettur í aug. 97. Koyrt 60.000 km. Góðkendur síðstu ferð av Bileftirlitinum feb. 2002 uttan viðmerkingar.

Hevur góðkendan/skrásettan sleipikrók.

Ein „Ikki-roykjara-bilur", ið kraftar sera væl og vælhildin í allar mátar.

Powerstýring og sentrallás. 4 nýggj, óslitin píkadekk á felgum fylgja við. Sera tryggur í hálku.

Prísuppskot 70.000 kr.

**Tlf. 314624 ella 215353**

veitst tú ikki tað?

# Advokatfulltrúi søkist

Søkt verður við hesum eftir advokatfulltrúa at byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Bæði nýggir løgfrøðingar og løgfrøðingar við royndum kunnu søkja.

Vit vænta, at viðkomandi hevur eina góða ástøðiliga barlast og hevur teldukunnleika á brúkarastøði, eins og góður kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

Harumframt vænta vit, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert, men ofta sera strævið starv við nógvum skiftandi arbeiðsuppgávum.

Skrivstovan arbeiðir serliga við rættarmálsviðgerðum og ráðgeving til fyritøkur innan- og uttanlands, kommunur og almennar stovnar.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður lønt eftir nærri avtalu.

Stutt umsókn saman við prógvum skal sendast til:

**Annfinn V. Hansen, adv.**
Bryggjubakki 22, boks 106,
110 Tórshavn
tlf. 359595 · telefax 359596

Til handilin við Hoyvíksvegin verður søkt eftir fyrikomandi og kvikari

# krambakvinnu

til skiftandi vaktir. Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Gvøbjørg.

**HJÁ GUNLEiVi**

Tlf. 22 51 61 ella 31 21 61

# TIL LEIGU

***Ognin Onnugøta 18, 188 Hoyvík verður lýst til leigu frá 1. august 2002.***



Í stovuhæddini er durður, gongd, wc, stova, stórur køkur v/útgongd á terassu, durður við inngongd til hjall, grovkøk/vaskirúm og kamar. Á loftinum eru 3 kømur, lítið baðirúm, hjúnarúm við stórum baðirúmið og útgongd á altan.

Stórur garður og pláss fyri fleiri bilum í túninum.

Húsini standa í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi, beint við fríøkið og vatn.

Verður leiga fyri min. 8.500,- uttan ljós og hita.

Nærri fæst at vita á
tel. 31 71 61 ella á t-post: hogni.dali@kallnet.fo



# Kvívíkar Skúli

**Søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003**

Søkt verður eftir lærara, til eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar Skúla, skúlaárið 2002/2003.
Starvið er 15 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið kann undirvísa í øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar Skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7 árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarahøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, fartlf. 211504 ella Jan Andreasen tlf 421575

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 22. juli 2002 kl. 12.00.

**Kvívíkar Skúlastýrið**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík

# Skrivstovustarv

Leirvíkar kommuna søkir eftir skrivstovufólki til alt vanligt skrivstovuarbeiði at arbeiða hálva tíð. Viðkomandi má hava kunnleika til bókhald.

Løn samb. sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 22. juli 2002**.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík

# Grundstykki

Byggibúgvið grundstykki í Havn, Hoyvík ella á Argjum ynskist til keyps ella í býti við grundstykki í Havn.

**Tlf 21 00 25 ella**
**t-post: joan@knudsen.dk**

# Summarferia

Vegna summarferiu eru verkstaðið og eykalutagoymslan stongd frá 15.07 til 19.08.02

Bilasølan er opin sum vanligt.

FIAT

**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir hjálparfólki til Ellis- og umlættingarheimið.

**Starvið**
Starvið er eitt ½ starv. Arbeiðið fevnir um vanligt hjálparfólkaarbeiði og alt vanligt arbeiði á heiminum, t.d. eldrarøkt og reingerð.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. august 2002.
Løn sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus ella Hanne Mi á Brúgv, tlf. 31 73 39 ella 315522.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um royndir og við møguligum viðmælum skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi, í seinasta lagi 24. juli 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur til Lítlaskóg

Lítliskógur søkir við hesum eftir pedagogi og hjálparfólki.

**Starvið**
Talan er eitt avloysarstarv 35. t. í barnagarði, í fyrsta umfari fram til summarfrítíðina.

**Stovnslýsing**
Á Lítlaskógi ganga 88 børn. Stovnurin er skipaður við tveimun vøggustovun við 10 børnum og 4 barnagarðsstovum við 17 børnum. harav tann eina er skipað við 6 ára gomlum børnum.

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at gera tína ávirkan á stovnin.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Frígerð Sundsskarð leiðara, ella Heidi Norðoy varaleiðara tel. 319131 .

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu vera Lítlaskógi, box 217, 110 Tórshavn í hendi skjótast til ber og í seinasta lagi fríggjadagin 26. juli 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Endurlýsing
## Leiðari til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara, 40 tímar um vikuna, til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini at byrja 1. august 2002.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin heldur til í egnum hølum í Badmintonhøllini og hevur atgongd til høllina hvønn dag til kl. 15.00. Á stovninum eru 48 børn, sum ganga í 1. flokki í Hoyvíkar skúla.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert arbeiði har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin.

**Vit ynskja at umsøkjarin**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum frítíðarskúla
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing og umsorgan fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur kunnleika til teldur

**Setanarviðurskifti og løn**
sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 30. juli 2002. Viðmerk á umsóknina "Leiðari til frítíðarskúlan".

SNARSKIVAN

# SØLUFÓLK
## til køksdeildina

**Køksmiðstøðin søkir eftir sølufólki at byrja beinanvegin.**

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta, at tú ert ágrýtin, stinn/ur, dugnaligur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 20. juli 2002 og skal sendast til:

Køksmiðstøðin
Á Hálsi
110 Tórshavn
att: Vinjard Johansen

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Vinjard Johansen, leiðara, á tel. 22 40 51

Elkeyp
**Køksmiðstøðin**
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30